# Skelkandi kanning: Nógv eiturevni í laksi úr alibrúkum

**Granskarar siga, at fólk eiga ikki at eta meiri enn gott 50 gramm av føroyskum og skotskum laksi um mánaðin**



*Tað er ikki so sunt, sum vit halda, at eta aldan laks, siga amerikanskir granskarar og aldur laksur úr Føroyum og Skotlandi hevur serliga nógv eiturevni í sær.*

*Myndin er tilvildarlig*

LAKSUR OG HEILSA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað kann verða heilsuskaðiligt at eta aldan laks.

Hetta er tann skelkandi niðurstøðan, sum granskarar á lærda háskúlanum í Indiana í USA eru komnir til eftir umfatandi kanningar.

Og teir siga eisini, at aldur laksur úr Føroyum og Skotlandi er serliga vandamikil.

Tí mæla teir eisini fólkið til at eta nógv minni av aldum laksi, enn tey higartil hava gjørt.

Amerikansku granskararnir mæla til, at fólk eta ikki meiri enn tvey ounce av føroyskum ella skotskum laksi um mánaðin.

Hetta eru ikki meiri enn 56,8 gramm av laksi.

Tað er ongin loyna, at alivinnan í Føroyum, og aðrastaðni við, er í svárari kreppu, men hetta verður mett at vera tann største hóttanin av øllum og fær tað rótfesti ímillum vanliga brúkaran, at tað kann elva til heilsuskaðar at eta aldan laks, kann tað verða seinasti seymurin í kistuni hjá alivinnuni.

### Serliga ringt í Føroyum og Skotlandi

Granskararnar úr Indiana haava kannað aldan laks nógva sataðni frá fyri 14 ymisk sløg av eituri, sum øll eru undir illgruna fyri at elva til krabbamein. Eitt nú er kannað eftir, hvussu nógv dioxin og pcb er í teimum.

Teir siga eisini, at hetta er tann mest víttfevnda kanningin, sum nakrantíð er gjørd av, hvussu nógv eitur er í laksi.

Í hesum sambandi hava teir kannað yvir tvey tons av laksi, sum teir hava keypt í handlum í Norður- og Suðuramerika og í Evropa.

Og úrslitið av kanningunum er, at laksurin úr alibrúki hevur nógvar ferðir størri mongdir av hesum eiturevnum í sær enn villi laksurin hevur.

Av teimum 14 evnunum, sum vórðu kannað, hevur aldur laksur munandi meiri í sær av 13 evnum, enn villur laksur hevur.

Og serliga ringur er altso laksurin úr Føroyum og úr Skotlandi.

Fóðurið, sum aldur laksur fær, er ofta fiskamjøl. Hetta førir við sær, at eiturevni, sumer í fiskinum, ið verður mældur til mjøl, endar í tí alda laksinum, har tað alsamt hópar seg upp. Tí hevur aldur laksur nógv meiri av hesum eiturevnum í sær enn villur laksur hevur, sum fær meiri fjølbroytta føði.

Amerikansku granskararnir siga, at av tí at vanliga fatanin hevur verið, at tað er sunt at eta laks, er tað rætt, at fólk fáa at vita, at tað kann eisini vera heilsuskaðiligt, serliga hjá teimum, sum eta laks regluliga.

### Fyrimunirnir størri enn vansin

Í Skotlandi hevur hendan kanningin vakt øsing. Har siga myndugleikarnir, at amerikansku granskararnir villleiða fólk.

Samstundis vísa skotar á, at yvir 5.000 vísindaligar kanningar prógva, hvussu sunt tað er at eta aldan laks, men hesa sannroynd seta amerikansku granskararnir til viks.

Myndugleikarnir í Skotlandi siga eisini, at fyrimunirnir við at eta aldan laks eru nógv størri enn vansarnir.

Samstundis siga teir, at mongdirnar av ymsum evnum, sum aldur laksur hevur í sær er innanfyri tey hámørk, sum ES hevur ásett.

# Kann verða ein hóttan sum skal takast í størsta álvara

**Pál Weihe, granskari, sigur, at úrslitið hjá amerikansku granskarunum skal takast í størsta álvara og hann mælir til, at føroyingar taka málið upp**



*Hetta er ein trpulleiki, sum vit ikki sleppa at sópa undir teppið, sigur Pál Weihe, lækni og granskari*

LAKSUR HEILSA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hesum kunnu vit ikki renna undan.

Pál Weihe, lækni og granskari sigur, at kanningin hjá amerikansku granskarunum, skal takast í størsta álvara.

Aðrastaðni í blaðnum endurgeva vit kanningarúrslit frá amerikanskum granskarum sum ávara ímóti at fólk eta ov nógvan aldan laks.

– Hetta er ein kanning, sum er kunngjørd í viðurkenda tíðarritinum Science Magazine og bara tað sigur okkum, at hon skal takast í álvara, tí hetta er eitt tíðarrit, sum verður mett at vera sera álítandi.

Sjálvur man hann vera tann føroyingur, sum veit mest um eiturevni og mat, ikki minst ígjøgnum grindakanningarnar, sum hava vakt ans um allan heim.

Og hann sigur, at tað er ongin orsøk hjá føroyingum at fara at trætast við amerikansku vísindamenninar ella at royna at sáa iva um teira úrslit.

Hann sigur, at hann hevur leingi væntað, at spurningurin um eiturevni í aldum laksi fór at koma upp og tað hevur hann gjørt vart við hjá føroyskum myndugleikum.

### Mugu taka málið upp

Og nú amerikansku granskararnir hava lagt síni úrslit fram, vil hann ikki gera viðmerkingar til tað, sigur Pál Weihe.

– Men tað, teir koma fram til, er ódámligt, tí teir siga, at laksur úr Evropa er serliga eitraður og tí er hetta ein beinleiðis hóttan ímóti okkum.

Hann heldur, at tað einasta, vit eiga at gera, er at taka úrslitið av kanningini upp í fullum álvara, tí eitt er vist: Hetta er ikki ein trpulleiki, sum vit sleppa at sópa undir teppið og so er hann gloymdur aftur. Nú er spurningurin reistur og hann kemur framhaldandi at verða reistur aftur og aftur.

Spurningurin er so, hvussu vit best taka trupulleikan upp.

– Tað, vit eiga at gera, er at leggja stóran dent á at granska hesar spurningar sjálvir. Vit eiga sostatt at seta okkara egnu gransking í verk fyri at prógva, hvussu nógv av ymsum eiturevnunum er í okkara laksi, afturímóti øðrum laksi.

Samstundis eiga vit at kanna eftir, hvørji árin hetta hevur á fólkaheilsuna, tí tað vita vit ov lítið um.

Annars heldur Pál Weihe, at er hetta ein trupulleiki við eiturevnum í aldum laksi, er hetta ikki bara ein trupulleiki hjá okkum.

– Er eiturevnið í okkara laksi, eru hesi evni komin onkustaðni frá. Tey eru komin úr uppisjóvarfiski, har tey hava hópað seg upp. Tá ið uppisjóvarfiskurin so verður malin til fóður, enda evnini í laksinum. Tí er hetta ein alheims trupulleiki sigur Pál Weihe.

Somuleiðis heldur hann, at eru skaðilig evni i laksafóðurið, kundi tað eisini verið eitt sjálvsagt granskingarevni í hesum sambandi at funnið útav, um tað ber til at reinsa hesi skaðiligi evnini úr laksafóðurinum.

– Í øllum førum eiga vit at gera, hvat vit kunnu fyri at minka um tey skaðiligu evnini í laksinum.

Annars heldur at Weihe, at hetta er ein spurningur, sum reisir klassiska kjakið um fyrimunir og vansar.

– Vit vita, at tað eru stórir heilsuligir fyrimunir við at eta laks og annan feitan fisk. Men kann heilsuskaði eisini standast av tí, má vigast fyri og ímóti um fyrimunirnir eru størri enn vansarnir.

Og hann sær fyri sær, at tað endar við einum kosttilmæli um, hvussu nógv tað er ráðiligt at eta av aldum laksi.

Annars sigur Pál Weihe, at amerikansku granskararnir hava lagt sínar kanningar eftir tí støðinum, sum EPA (Enviromental Protecton Agency), ið er ein umhvørisverndarstovnur hevur lagt. Men hesin stovnurin setir nógv strangari krøv enn FDA (Food and Drug Administration), sum er matvørueftirlitið, setir, sigur Pál Weihe.




